## Skótafundir byrja aftur mánakvøldið

Allir smáskótar, skótar og leiðarar møta klokkan19. Eisini tey, sum ikki hava verið skótar eru vælkomin við til skótarnar, siga KFUM OG K skótarnir í Klaksvík. Tey siga, at sum skóti upplivir tú nógv spennandi, lærurikt og gott. - Tú fært góðar vinir, kemur til aðrar bygdir og lærir at brúka tíni evni. Vit hava eisini brúk fyri góðum leiðarum, so um tú vil hjálpa okkum og vera við í leiðara-bólkinum, so kanst tú eisini koma á fund komandi mánakvøld. Tann 1. september byrja vit so við regligum fundum, kl.17,30 møta smáskótar 7-8 ára gomul, kl.19 møta tey 9-10 ára gomlu. Týsdagin 2. september møta miðskótar 11-14 ára gomul kl.19. Ungdómsskótar møta eitt kvøld, sum passar best til tey, siga tey úr Klaksvík, sum ynskja øllum vælkomnum á skótafund.

## Oljustuðul og betri fiskaprís

Grønlendska fiski- og veiðimannafelagið KNAPK vil hava landsstýrið at útvega limunum størri oljustuðul umframt betri fiskaprísir. Landsstýrið hevur fyrr sýtt fyri at geva vinnuni stuðul til oljukeyp, men eftir at landsstýrismaðurin í fiskisivinnumálum, Finn Karlsen, hevur sagt seg skilja áheitanina frá fiski- og veiðimonnunum, hevur felagið gjørt av at royna eina ferð afturat. Samstundis vil KNAPK hava Royal Greenland at lata meiri fyri fiskin.

# Stríðið í Kaukasus breiðir seg til Miðeysturs

**Ein avleiðing av stríðnum í Georgia er, at Sýrialand ætlar sær at økja tað hernaðarliga samstarvið við Russland**



*Tveir av samstarvsmonnunum hjá Russlandi ví Miðeystri, sýriski forsetin Bashar al-Assad og iranski forsetin Mahmoud Ahmadinejad*

Mynd Polfoto

*Tveir av samstarvsmonnunum hjá Russlandi ví Miðeystri, sýriski forsetin Bashar al-Assad og iranski forsetin Mahmoud Ahmadinejad*

Mynd Polfoto

Undir kalda krígnum var tætt samstarv millum Sovjetsamveldið og Sýrialand, og nú er líkt til, at Sýrialand hevur hug at nærkast Russlandi. Uttanríkisrpolitiskir eygleiðarar hava leingi sagt, at Moskva vil sleppa at endurnýggja tað gamla sambandið við Damaskus, og tað er líkt til, at russar fáa sín vilja.

Í hesum døgum er sýriski forsetin, Bashar al-Assad, á vitjan í Moskva og í gjár hitti hann Dmitrij Medvedev, forseta. Undan fundinum duldi sýriski forsetin ikki fyri, hvørji ørindi hansara eru.

- Hernaðarligt og tekniskt samstarv er sjálvandi tað týdningarmesta evnið. Vápnakeyp er eitt sera týðandi evni, og eg haldi, at vit eiga at seta meiri ferð á hetta samstarvið. Vit mugu hava í huga, at Vesturheimurin og Ísrael leggja altsamt størri trýst á Russland, segði al-Assad við russiska blaðið Kommersant í gjár.

Í 2002 koyrdi George W. Bush, forseti, Sýrialand í sama leyp sum Iran og Norðurkorea, og tað hevur elvt til øði í USA og Ísrael, at Russland kanska fer at selja Sýrialandi vápn.

### Ísrael hjálpti Georgia

Í samrøðuni við Kommersant sigur sýriski forsetin, at gongdin í seinastuni vísir, at tað er neyðugt at styrkja tað hernaðarliga samstarvið millum Russland og Sýrialand. Eygleiðarar siga, at orðini hjá forsetanum hava helst samband við, at sambært russum brúkti georgiski stjórnarherurin ísraelsk vápn ella vápn úr Ísrael í bardøgunum við russiska herin. Harafturat vilja russar vera við, at ísraelskir heryvirmenn hava vant georgiska herin.

Sýriski forsetin sigur við Kommersant, at viðurskifti sum hesi fara at fáa fleiri lond í Miðeystri at knýta tættari samband við Russland.

- Eg haldi, at allir russar og fólk aðrastaðni eru nú greið yvir leiklutin hjá Ísrael og landsins hernaðarligu ráðgevar í georgiska herinum. Og var tað nakar í Russlandi, sum helt, at hesar deilirnar kundu vera vinarliga sinnaðar, so er tað neyvan nakar, sum hugsar so í dag, sigur al-Assad við russiska blaðið.

# Gíslatøkan í Dubrovka á Tjóðpalli Føroya

**23. oktober var ein dramatisk gíslatøka í einum leikhúsi í Moskva. Tjetjenar kravdur Russland at taka seg aftur úr Tjetjenina. Sorgarleikurin kostaði 170 mannalív. Hendingin fer nú á pall á Tjóðpalli Føroya**

GÍSLATØKA
*Tíðindaskriv*

Mikudagin tann 23. oktober 2002 kl. 21.05 storma 42 tjetjenar Dubrovka-leikhúsið í Moskva. Teir steðga framførsluni og taka 850 áskoðarar sum gíslar. Teirra krav: Fullkomin afturtøka av tí russiska herinum úr Tjetjenia. Gíslatøkan varar í 57 tímar og kostar 170 mannalív.

Týski høvundin Torsten Buchsteiner hevur skrivað ein sjónleik um gíslatøkuna, sum verður fyrsta leikverk hjá Tjóðpalli Føroya leikárið 2008 - 2009.

Leikurin Nordost er um tríggjar kvinnur, sum allar á hvør sín hátt vórðu knýttar at sorgarleikinum á Dubrovka-leikhúsinum:

(Navn) er tjetjeni, sjálvmorðsbumbukvinna og ein av gíslatakarunum. (Navn) er lækni sum er á náttarvakt og situr uttanfyri leikhúsið til reiðar at veita hjálp. (Navn) er áskoðari, farin at njóta ein musikal saman við manni og dóttur, tá leikhúsið verður tikið. Hesar tríggjar siga okkum frá hendingini tíma fyri tíma soleiðis sum tær upplivdu tað. Tær hava hvør sítt sjónarmið og hvør sína fatan av krígnum í Tjetjenia – og allar hava tær rætt – hvør á sín hátt.

Fyrsta sýning av Nordost verður 19. september 2008, Ria Tórgarð leikstjórnar og André Niclasen hevur umsett.

Leikarar eru Gunnvá Zachariasen, Súsanna Tórgarð og Birita Mohr.

Pallinum og ljósinum standa Árni Baldvinsson og Símun Pauli Hansen fyri, meðan Katrin Bonde tekur sær av búninum.

22. september byrja eisini venjingarnar av spildurnýggjum føroyskum familjuleiki. Tað er Í Geyma eftir bók hjá Dánjali Hoydal, sum Dánjal sjálvur hevur gjørt til leik saman við íslendska leikstjóranum Águstu Skúladóttir. Pallmyndina ger Gudrun Øyahals, ið eisini gjørdi pallmyndina til einmansleikin Sellofan, meðan Katrin Þorvaldsdóttir stendur fyri búnum og maskum.

Í Geyma hevur heimsfrumsýning í nýggju høllini í Norðurlandahúsinum 7 . november.



*Minnisvarði yvir tey 170 fólkini, sum fullu í gíslatøkuni í Dubrovka leikhúsinum í Moskva í 2002*